## DAGSINS MEINING

# Kallið nú spakan fyri spaka

Tað er nærum tragikomiskt at hoyra orðaskiftið, nú ein lutvís liberalisering av rúsdrekkalógini skal leggjast fyri tingið. Eitt lógaruppskot, sum fleiri ferðir er steðgað í gongu síni móti løgtinginum, tí einstakir tingmenn hava gjørt hetta til kardinalspurningar. Men har Bjarni Djurholm hevur víst støðufest og dirvi at halda fast um ætlanina. Eisini hóast smølu samgongurnar hava forðað fyri løgtingsviðgerð, hóast tað væl kann vera ein meiriluti av tinglimunum, sum tekur undir við hesum. Trupulleikin er bara, at tann meirilutin ikki er í samgonguni. Skilji tann, sum skilja kann.

Er hetta ein margháttlig støða, so er tað enn meira marghátttligt, hvussu orðaskiftið undan løgtingsviðgerðini hevur tikið skap.

Eitt av argumentunum fyri at broyta lógina er, at løgreglan hevur havt eitt ynski um hetta! Er ein av hornasteinunum í rættarsamfelagnum ikki júst greiður skilnaður millum lóggevandi, útinnandi og dømandi valdið? Her er bland komið í, so tað forslær. Fyri eygleiðaran at síggja eitt - kanska sterkt - bland, sum einamest líkist onkrum formi fyri passivari sjálvtekt, har løgreglan á nógvum økjum púrasta konsekvent hevur noktað fyri at hondhevað lógina. Nakað sum er og hevur verið sjónligt við hópin av tiltøkum kring landið.

Samstundis standa fyrireikarar skríggjandi við moralska peikifingrinum, har sagt verður, at sleppa hesi eisini at fyriskipað øl- og rúsdrekkasølu, so verður talan um betri skipan á økinum - og harvið minni rúsdrekkanýtslu!

Fyrst er at siga, at uppskotið als ikki leggur upp til, at fyrireikararnir sjálvir skulu standa fyri útskeinkingini. Og tí er liberaliseringin ikki so liberal, sum hesi vilja hava. Men at siga, at tað verður minni drukkið, tí skipað eftirlit verður, er at vera bæði bláoygdur og innbilskur ísenn. Sjálvandi vilja handilsfólk sleppa at selja bæði øl og tað, sum sterkari er til festivalar, stevnur og onnur tiltøk. Stykkjatalið er av slíkum slag, at hetta uttan iva merkir inntøkur í 100.000-klassanum. Og at fyrigykla fólki, at tað er idealisma og afturhald, sum eru hornasteinarnar í hesum útsagnum, hevur lítið hald í veruleikanum.

So kallið barnið við sínum rætta navnið. Tað hevur Miðflokkurin verið einsamallur um higartil. Og latið ikki bland koma ímillum tey trý statsveldini, tá lógir skulu smíðast. Vil (ting)fólkið hava eina hægri grad av liberallisering á økinum, so fremji tað í verki - uttan undanførslur ella argument, sum einki hald hava í veruleikanum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Meira tunlaprát


**HEINI OLSEN**
Verkfrøðingur




**Gerið vegaloysnina fyrst, og er hon ikki nøktandi um hundrað ár - roynið so tunnilsloysnina, sigur Heini Olsen millum annað í lesarabrævi**

Nú er so nógv skrivað og talað fyri ella ímóti sub-leirvíksum tunli, at fólk so smátt eru farin at vamlast við hetta óendaliga tjakevni, sum eftir mínari meting ikki er so torført at loysa.

Sjálvur átti eg helst eisini at tagt, hetta serliga tá eg í móðurlegg eri ættaður undan Ussala-Pæturi og sostatt á henda hátt kanska komi mær í strið við okkurt av skyldfólkunum á Húsamørk í Leirvík; men tað gerst so ikki við. Hinvegin harmar tað meg, um tey tvíhalda um okkurt, tey seinni noyðast iðra seg um.

Í útvarpstjakinum mikukvøldið 1. mars kom einki fram um "kirkjutunnilin," sum eg nevni hann, nú so nógvir eru á lofti, annað enn, at bygdarráðið var samt um, at har skuldi leiðin liggja – alt gott um eina semju at siga; men annars talaði hesuferð enn meira fyri teirri ovaru loysnini, har vegurin er annar møguleikin og ein tunnil har uppi hitt uppskotið, um rindast vil eyka fyri tað loysnina.

Nú dámar mær í hesum ófriðatíðum best at skriva okkurt lættisoppasligt; men søgan um leirvíkarleiðina nærkast so mikið restini av umheiminum, at eg í fullum álvara seti fram hetta uppskot og grundgevi fyri tí:

**Gerið fyrst vegin oman fyri bygdina.**

**Við hesum kunnu leirvíkingar sjálvir stýra framburðinum í Leirvíkar bygd og har á leið**

Hann lýkur allar treytir og væl meira enn tað, tí umframt vanliga autoverju er eyka verja gjørd fyri larm, sum kanska als ikki er har, tí ljóð fer eins og hiti ikki so nógv niður eftir, sum upp í loft.

Vegurin gevur góða atgongd til stóra lendið omanfyri, har ítróttarvøllurin liggur, serliga um samstundis hampað verður um verandi atkomuvegin frá ætlaðu íbindingunum og niðaná – tunnilstilfar til hetta endamál trýtur ikki.

**Við hesum vegi bindur bygdarráðið um heilan fingur**, tí nú hava teir vegin, sum undir øllum umstøðum einaferð skal gerast, eins og víst er í bygdarplaninum heilt afturi í 80-num, hetta um nakar framburður verður í Leirvík.

**Tað verða bygdini dýr grundøki, um hesi eru tað, sum forðar fyri at leiða ferðsluna niðan um bygdina!** Leirvíkar kommuna er vælsignað við størri byggivídd enn kanska nøkur onnur bygd í Føroyum.

Við hesum verðu eingin ferðsla gjøgnum bygdina, uttan so, at hin ferðandi í onkrum ørindum ynskir at snara frá í ferðslurundingunum hvørju megin bygdina, at vitja tað, sum har er, tað verið seg havnarlagið, vinnurekandi ella vinfólk.

**Heldur brúka ætlaða vegaøkið har niðri til parkering** til tey vitjandi, enn hetta fremmanda mitt gjøgnum bygdina.

**Ella tunnil oman fyri bygdina**

Sjálvur eri eg sannførdur um, at við omanfyri nevnda møguleika fyri vegi er ein tunnil óneyðugur; men fæst ikki semja um vegin, so er tunnilin omanfyri eftir míni meting so avgjørt frægari enn tað fremmandalikamið, sum talan er um at leggja niðanvert kirkjuna, og sum við tvinnum longum rampum – ein í hvørjum enda. Í hvussu er ger "kirkjutunnilin" stóra kollveltandi broyting í friðarligu bygdarmyndina, og forðar í stóran mun fyri møguligum vinnuætlanum nærhendis havnarlagnum. Hvat heldur friðingarmyndugleikin um hetta?

**Vísir vegurin omanfyri seg um hundrað ár ikki at nøkta tørvin, so liggur "kirkjutunnilin" ella eitt av hinum uppskotunum enn óroynt, hetta um ikki alt er útbygt.**

**Stóra økið Úti á Vík varð einki tosað um;** men tað er kortini framtíð, sum hongur saman við planløgdu íbindingunum sunnan fyri bygdina.

**Ein lítil viðmerking umVágatunnilin, tunnil undir Háls og veg oman fyri Sandavág og Miðvág**

Ein yndislig kvinnurødd gramdi seg um, at Vágatunnilin ikki varð førdur heilt oman til Sandavágs, og um ferðsluna har og í Miðvági.

Til hetta kann eg siga, at millum tær 16 kannaðu tunnilsleiðirnar undir Vestmannasundi, var eisini ein, sum kom út við Smyrlagjógv oman fyri Sandavág; men varð hon so long, at fígging tá neyvan kundi fáast fyri tí loysnini. Eisini var hildið í so fall best vera við **tvinnum tunlum**, har annar er hin verandi Vágatunnilin og hin tunnilin frá norðanvert tunnilsmunnan vágamegin og í Smyrlagjógv. Tað prosjektið varð gjørt í 80-unum og hongur á goymslu.

Annað, sum hongur á goymslu, er ein vegur í framhaldi frá Smyrlagjógv og oman fyri Sandavágs og Miðvágs bygdir við íbinding til verandi landsveg við Leitisvatn. Hetta loysir spurningin um ferðslu gjøgnum bygd øki og er saman við Hálsatunlinum meira brúkbært fyri øll og munin bíligari enn tunnil av Oyrargjógv til flogvøllin, sum einans tænir flogferðsluni.


# Illur???




## Sig tína meining í Sosialinum


**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.